VIÐMERKINGAR

# Undirgrundin og søgufalsan

**Halgir Winther Poulsen**



Í stórari grein í bløðunum herfyri undir yvirskriftini »Tá søgan er følsk, verður framtíðin til fals« viðger formaður Tjóðveldisfloksins søgufatan og -falsan løgmans, og er greinin eftir øllum at døma svar til eina grein hjá løgmanni, ið viðger nýggja politikk Tjóðveldisfloksins.

Eftir at hava lisið tann partin av greinini, ið hevur yvirskriftina »Undirgrundin sum dømi«, má eg viðganga, at eg eri bæði bilsin og ikki sørt skelkaður. Eftir at hava latið fólk vita, at tað fyrst og fremst er Tjóðveldisflokkinum fyri at takka, at vit ikki endaðu við »grønlendsku loysnini«, sum Javnaðarflokkurin og fólkaflokkurin skuldu vera við at góðtaka, sigur hann (orðarætt endurgivið): »*Tá fundurin við Schlüter var í 1992, hevði landsstýrið millum annað í skjáttuni eitt føroyskt útspæl til at góðtaka eina grønlendska loysn - men Schlüter tók teir á bóli.*«

Hesi orðini í einari grein, ið viðger søgufalsan, eru so burtur úr vón og viti, at tað ber ikki til at lata tey standa ósvarað. Sipað verður til fundin tann 11. september 1992 millum landsstýrið og donsku stjórnina, har endamálið var at fáa gongd á aftur arbeiðið í føroysk-danska embætismannabólkinum, eftir at stígur var komin í orsakað av trupulleikum hjá danska partinum at orða mótuppskot til tey greiðu og vælgrundaðu sjónarmiðini hjá føroyska partinum um yvirtøku av málsøkinum ráevni í føroysku undirgrundini sum sermál sambært heimastýrislógini.

Rætt er tað, at landsstýrisumboðini Jógvan Sundstein og Aage Ellefsen saman við Atla Dam, løgmanni, høvdu ymisk sjónarmið og uppskot um, hvussu gongd kundi fáast á aftur samráðingarnar, við á fundin við donsku stjórnina, og rætt er tað eisini, at ikki varð neyðugt at leggja hesi fram á fundinum, tí Schlüter boðaði frá, at hann við góðkenning frá stjórnini hevði gjørt av, at nú var tíðin komin at loysa hesa drúgvu ósemju.

Eg var sjálvur við á fundinum og kann vátta, at í tí tilfari, ið var fyrireikað til fundin, var eingin tilsipan til ella nakað uppskot um nakað, ið líktist grønlendsku loysnini at finna. Nú var eg ikki í skjáttu løgmans, men tað kann tjóðveldisformaðurin av góðum grundum heldur ikki hava verið.

Føroyska kravið var øll tey árini, eg var við í hesum arbeiði, púra greitt at undirgrundin varð yvirtikin sum sermál sambært heimastýrislógini. At hetta eisini var enda gjørdist loysnin var ikki minst orsakað av, at so gott sum allir flokkar vóru samdir um hetta kravið øll árini frá tí at gongd kom á samráðingarnar eftir avtaluna millum Atla Dam, løgmann, og Poul Schlüter, forsætisráðharra, á fundinum tann 29. august 1988. Á tí fundinum luttóku umboð fyri allar flokkarnar í táverandi samgonguni, Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Framburðsflokkin.

Tann breiða og varandi politiska semjan gjørdi tað eisini møguligt at leggja samráðingarnar tilrættis og føra tær við vissu um, at hóast tær gjørdust drúgvar, fór ikki at verða neyðugt at broyta støðu orsakað av politiskum ósemjum í Føroyum.

Forsøgan til fundin tann 29. august 1988 er í stuttum tann, at danska stjórnin hevði víst øllum samráðingum um yvirtøku av málsøkinum aftur. Tó samdust partarnir í mai 1986 um at seta eina felagsnevnd at viðgera málið, men hendan nevnd varð ongatíð sett, orsakað av at semja ikki fekst um arbeiðssetningin (kommisorið). Í juli 1985 fekk landsstýrið »gula álitið«, har stjórnarskipanarligu grundgevingarnar hjá stjórnini fyri at sýta fyri realitetssamráðingum vórðu viðgjørdar og afturvístar.

Í august 1988 bað landsstýrið um nýggjan fund við stjórnina, eftir at landsstýrið hevði latið málið kanna nærri og fingið trý álit, »tað reyða« um stjórnarrætt v.m., »tað bláa« um altjóðarætt v.m. og »tað hvíta« um hugsandi praktiskar loysnir. Saman við áheitanini um fund sendi landsstýrið stjórnini eitt memorandum, ið bygdi á hesi álit, og har føroyska kravið um samráðingar um yvirtøku av málsøkinum var lýst og gjølla grundað.

Á fundinum í august 1988, ið sum nevnt endaði við, at stjórnin gekk við til at fara undir realitetssamráðingar, vísti Schlüter til grundgevingar landsstýrisins og brúkti tær sum grundgeving fyri at broyta støðu stjórnarinnar frá »der er intet at rafle om« til at samráðast skuldi um málið.

Tað gekk kortini drúgv tíð, áðrenn felagsnevndin kundi fara til verka, av tí at partarnir vóru ósamdir um formannin og endaligu orðingina av arbeiðssetninginum. Eftir at hesir spurningar vóru avgreiddir arbeiddi nevndin uttan trupulleikar inntil stígur kom í, orsakað av at tær heimildir, partarnir hvør sær høvdu fingið frá sínum politikarum, ikki fingust at røkka saman. Nevndarlimirnir báðu megin bóðu tískil sínar politisku uppdragsgevarar um meira nágreiniligar politiskar útmeldingar. Tað gjørdist tí neyðugt við nýggjum fundi á politiskum stigi, og tann fundurin varð hildin tann 11. september 1992. Tað var á hesum fundinum at avtalan um yvirtøku av málsøkinum ráevni í føroysku undirgrundini var gjørd.

Hendan avtalan varð undirskrivað av Atla Dam, løgmanni, og Poul Schlüter, forsætisráðharra, tann 22. desember 1992 í Tórshavn, og við hesum varð endaligt punktum sett fyri einari ósemju landanna millum, ið hevði vart síðan løgtingið á fundi tann 13. mai 1948 samtykti at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um yvirtøku av undirgrundini. Avtalan er til skjals í Kunngerðarsavninum sum kunngerð nr. 96 frá 13. mai 1993.

Sjálvur tók eg lut í hesum arbeiði síðan 1984, frá 1987 saman við Árna Olafsson, og kann vátta, at eg ongatíð hoyrdi nakran flokk við undantak av sambandsflokkinum gretta eitt orð um eina loysn, ið á nakran hátt kundi sammetast við grønlendsku loysnina.

# Skulu vit aftur til peikipinn og skammikrók?

**Hvørja skúlapolitiska kós hevur sitandi samgonga?**

**Bergur Djurhuus Hansen**
*studentaskúlalærari*

Felagið hjá Studentaskúla- og HF-lærarum mótmælti fyri stuttum alment, at 26 næmingar eru í tveimum av flokkunum, sum byrjaðu skúlagongdina í Hoydølum í ár. Hetta er brot á skrivliga avtalu millum lærararnar og Mentamálaráðið, sum ásetur, at í mesta lagi 24 næmingar skulu verða í hvørjum flokki. Mentamálaráðið hevur sum aftursvar víst á, at málið fer at loysa seg av sær sjálvum, tí fleiri næmingar helst fara at gevast, áðrenn langt um líðir. Men grundgevingin er heldur veik. Fyri tað fyrsta er tað undir øllum umstøðum brot á avtaluna, sum sigur, at í mesta lagi 24 skulu verða í hvørjum flokki (eisini við skúlaársbyrjan), og harumframt er tað heilt burturvið at taka næmingar inn á skúlarnar við teirri fortreyt, at so og so nógvir av teimum skulu gevast. Hetta avdúkar eina hugsan úr farnum tíðum, tá tað var avgerandi at fjálga um tey, sum frammanundan vóru væl fyri, og sálda hini frá. Endamálið við miðnámsútbúgvingunum í dag má verða, at so nógv sum gjørligt av teimum, sum byrja eina miðnámsútbúgving, fáa prógv.

### Hví tílíkt stríð?

Tað er tó ikki løgið, at eitt tílíkt stríð tekur seg upp. Lærararnir leggja dent á eitt gott umhvørvi í skúlunum og dygd í útbúgvingini, Mentamálaráðið hinvegin er undir politiskum trýsti og vil gera skúlaskipanina einfalda at umsita og bíliga at reka. Til ber eisini at spyrja, um tað er so stórur munur á 24 og 26 næmingum, og um ikki tað er rætt at spara við at lata fleiri næmingar ganga í hvørjum flokki.

Til hetta er at siga, at góðtaka lærararnir fyrst, at 26 næmingar eru í hvørjum flokki í ár, so kann talið gerast 28 ella 30 næsta ár. Møguliga er tað hetta, sum býr undir avgerðini hjá Mentamálaráðnum, og hvat er ein avtala tá verd? Tó snýr hetta seg ikki fyrst og fremst um prinsipp og avtalubrot, tað snýr mest um, hvussu hvør einstakur næmingur trívist í skúlanum, og hvør dygdin er í undirvísningini, næmingurin fær.

### Undirvísing fyrr

Fyrr í tíðini, t.v.s. fyri 30-40 árum síðani, bar væl til at hava heilt upp í 40 næmingar í hvørjum flokki í allari skúlaskipanini, líka frá byrjan til enda. Lærarin stóð uppi við talvuna og helt fyrilestur, meðan næmingarnir sótu og lýddu á. Guð náði tann, sum ikki sat stillur, tí neyðugt var við harðari disiplin. Av teimum 40 fingu tó bert eini 12-15 realprógv og upp aftur færri studentsprógv. Trivnaðurin í skúlanum mundi hjá mongum vera so sum so, og ivaleyst vóru tað fleiri við góðum evnum, sum ongantíð komu fyri seg. Hinvegin var samfelagið eisini øðrvísi tá, og krøvini til útbúgving ikki tey somu.

### Undirvísing í dag

Ì undirvísingini í dag verður støði í mest møguligan mun tikið í hvørjum einstøkum næmingi, og lærarin stendur ikki og heldur fyrilestur hvønn dag, men letur næmingarnar arbeiða. Tað merkir ikki, at talvuundirvísingin heilt er burtur, men at næmingarnir taka lut í tí, sum fer fram í flokshølinum og sjálvir eru við til at orða uppgávur, finna tilfar o.s.fr. T.d. skulu næmingarnir í fleiri lærugreinum sjálvir velja evni at skriva ritgerð um. Lærarin skal tá geva hvørjum einstøkum næmingi vegleiðing, og eydnast hetta væl, verður áhugin ein drívandi megi í undirvísingini. Men tað sigur seg sjálvt, at verða ov nógvir næmingar í hvørjum flokki ber tílík undirvísing ikki til, tá noyðist lærarin aftur at halda fyrilestrar, og so má hvør næmingur klára seg sum best. Stundir verða ikki til at tosa við hvønn næming sær og als ikki til at taka sær av teimum, sum av onkrari orsøk hava trupult við at skilja tað, sum lærarin ella aðrir næmingar siga. Trivnaðurin hjá næmingunum verður verri og dygdin í undirvísingini við.

### Hvat slag av skúla ynskja vit?

Seinastu nógvu árini hevur dentur verður lagdur á at fáa næmingarnar at trívast í skúlunum og gera teir áhugaðar í tí, teir skulu læra, heldur enn at tvinga teir til tað. Enski heimspekingurin Herbert Spencer tók til í eini grein longu fyri 150 árum síðan, at allar broytingar í undirvísingarverkinum áttu at havt sum aðalmál "to make the acquirement of knowledge pleasurable rather than painful.. and all education interesting", t.v.s. í mest møguligan mun gera atgongdina til vitan og útbúgving létta, hugaliga og áhugaverda. So langt er Mentamálaráðið eftir øllum at døma ikki komið enn.

### Ljótur minnisvarði

Næmingar í dag mugu sleppa at kjakast, gera viðmerkingar, spyrja, seta sær sjálvum uppgávur o.s.fr. Ikki bara tí teir á henda hátt menna eina sjálvstøðuga og kritiska hugsan, men eisini tí hetta er ein avgerandi treyt, skulu vit fáa næmingarnar at støðast í skúlunum og harvið røkka málunum, sum løgmaður og samgongan hava sett sær: at øll skulu fáa eina miðnámsútbúgving. Sleppur avgerðin hjá Mentamálaráðnum um at hækka talið av næmingum í hvørjum flokki at standa við, verður tað eitt stórt afturstig fyri undirvísingina í studentaskúlunum og eitt ljótt minni um sitandi samgongu.